# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroya Banki - ein bíligur banki?

Loksins upprann hesin dagur, at partabrøvini í Føroya Banka verða seld. Nú hava allir føroyingar høvi at seta sparipengarnar í partabrøv, og landskassin fær umsett einar tvær milliardir í bankum til reiðan pening.

Nógv hevur verið tosað um, hvørt virðið á bankanum er ov lágt ella ov høgt. Sum støðan er nú bendir alt á, at sera stórur áhugi er fyri bankanum, og tað bendir so aftur á, at kursurin er í lægra lagi.

»Hvat er ein milliard millum vinir« spurdi fyrrverandi foramaðurin í Búskaparraðnum, Hermann Oskarsson, herfyri, tá serfrøðingar høvdi mett virðið á bankanum at verða á leið tvær milliardir krónur. Henda útsøgn fekk nógvar politikarar at ressast við og at krevja broytingar í tilgongdini at selja bankan.

Men einki varð broytt, og nú bankin loksins er farin til sølu, er virðið áleið hesar somu tvær milliardir. Kursurin verður í mesta 189. Hinir peningastovnarnir mæla fólki til at keypa, tí kursurin er »góður« - og útlit eru fyri skjótum vinningi við aftur at umseta partabrøvini til pengar lutfalsliga skjótt.

Alt hetta bendir so aftur á, at bankin verður seldur ov bíliga. Taparin verður so landskassin - og vinnarin, ja, tað verður tann, sum hevur flestar pengar at keypa partabrøv fyri og sum dugir best at selja tey, tá kursurin er hægstur.

**Sosialurin**

## Sosialurin til Shanghai eftir agni?

ROLF GUTTESEN



*Hósdagin var ein løgin grein í Sosialinum. Yvirskriftin slær fast: "Nyrup skuldina av bankakreppuni." Greinin heldur fram líka so avgjørd: "Tað slær Jørn Astrup Hansen fast sambært donskum blaðmanni á Børsen, nú bókin um Føroya Banka er givin út á donskum."*
*So, so?*

Í hasum yvirskriftum eru minst tríggir feilir. Verri kann tað næstan ikki gerast av blaðmanninum Leo Poulsen, sum er farin at skriva í Sosialinum.

**Fyrst** tað minsta. Tað er ikki ein bók um Føroya Banka, men um føroyskar bankar í 100 ár, og sett í ein samfelagsligan samanhang, sum er nógv breiðari.

**Næsta**. Hvar slær Astrup ella blaðmaðurin á Børsen henda pástand fast, at Nyrup hevði skuldina av bankakreppuni? Ongastaðni. Nyrup er nevndur á fimm síðum í bókini hjá Astrup. Kanska eri eg hálvblindur, men eg síggi ongastaðni nakað, ið líkist hasum hjá harra Poulsen,

**Triðja**. Hevði Nyrup skuldina av bankakreppuni? Á síðu 121 eru sera kritiskar viðmerkingar. Men hesar viðvíkja tí, sum hendi 18. januar 1998, tá tað politiska eftirspælið fekk ein enda, við at kanningarnevndin legði síni úrslit fram. Bankakreppan var upp á tað hægsta í 1992-93, beint tá Nyrup kom til sum statsministari. Hann hvørki kundi ella hevði "skuldina av bankakreppuni".

Bankaskandalan í Føroyum verður bygd upp í 1970-unum og -80-unum, og henni hava føroyskir politikarar og banka- og vinnumenn – saman við miðlunum – fulla æru av. Men lættast er at geva øðrum skyldina.

**Hugo Gården skrivað ummæli í Børsen**

Blaðmaðurin hjá Børsen, Hugo Gården, sum í løtuni heldur til í Shanghai, hevur skrivað kritiskar bøkur um finansskandalur í Danmark, eitt nú "Ansvaret der blev væk."

Hetta nýggja ummælið í Børsen tann 5. juni, sum Leo Poulsen hevur borið eyga við, er ikki serliga umfatandi. Leggur mestan dent á allar seinasta part av søguni - tað sum hendi í tí politiska eftirspælinum. Men tá var kreppan av, tá vóru bankarnir lagdir saman, tann nýggi bankin hevði fingið nýggjan kapital og var farin at geva stórt avlop. Tað føroyska samfelagið var farið at fungera aftur.

**Hvat er dagsskráin hjá Sosialinum?**

Hvat er tað so, sum Leo Poulsen kann brúka. Tað kemur klárt fram í yvirskriftunum.

Hugo Gården sigur: **Politikere kludrede i Færøernes bank-krise.**

Leo Poulsen sigur: **Nyrup skuldina av bankakreppuni**

Ætlanin er klár. "Politikere" verður til – Nyrup; og "kludrede" verður til – skuldina av.

Leo Poulsen endurgevur (refererar) ikki. Hann vanskeplar og er tententiøsur.

Endamálið er heilt klárt - at laga uppundir mytuna um Nyrup sum ein fólkafigginda, og at "danir høvdu skyldina." - Tví fái tykkum!

Sum eygleiðari er tað loyvt at hava tað meining, at best hevði verið um bankarnir báðir bara fóru fallit í 1992. Tað hevur onkur føroyskur samfelagsfrøðingur hildið uppá, og helst er tað hetta, ið Hugo gården eisini meinar. Politikarar skuldu bara latið tragediuna gingið sína gongd? Tað meini eg er skeiv hugsan. Politiska loysnin mátti til. Hon kostaði danska statinum einar 9 millardir. Og helst vóru nøkur tiltøk sett í verk í skundi, tí tað var neyðugt.

**Jóannes Eidesgaard lagdur á ís**

Støðan bleiv ikki betri aftan á Fólkatingsval í 1998. Tá kom at standa á jøvnum millum stjórn og andstøðu, og nývaldi javnaðarmaðurin Jóannes Eidesgaard gjørdi seg kostbaran, tá Fólkatingið skuldi velja formann. JE vildi ikki stemma fyri javnaðarkvinnuni Birte Weiss, sum tí tapti til vinstramannin Ivar Hansen. Men tá sokallaði "pinsepakken" seinni sama ár skuldi samtykkjast, lat føroyska javnaðarumboðið seg keypa – dýrt. Síðan tá hevur verið ístíð millum hesar partar.

**Citatfalsan í Sosialinum**

Í greinini hjá Leo Poulsen er eitt citat, sama einsliga citat, sum Gården eisini hevur. Men tað er skeivt endurgivið hjá Poulsen.

Hugo Gården skrivar: "*Nyrup ofrede Richard Mikkelsen og Finanstilsynet og reddede dermed Lykketoft"*

Leo Poulsen skrivar: *"Nyrup ofraði Richard Mikkelsen, og Finanstilsynet bjargaði harvið Mogens Lykketoft" (*leggi merki til hvar eitt komma stendur)

Eg vil meina, at har er avgerandi munur á. Hetta citat stendur á síðu 121 í bókini hjá Astrup, og sami partur endar soleiðis: "Forløbet denne fredag eftermiddag var lidet værdigt."

Nú kunna vit skoyta uppí – framferðin hjá Sosialinum henda hósdagin var lítið sømilig. Skapa falskar mytur. Geva øðrum skyldina

10. juni 2007

## Svar til Rolf Guttesen

Tað er rættiliga vanligt, at miðlar taka upp evni, sum aðrir miðlar viðgera.

Greinin »Nyrup skuldina av bankakreppuni« byggir á eina grein í Børsen og er ikki nakað, sum greinskrivarin sjálvur hevur funnið uppá. Nakað, sum harra Rolf Guttesen, ikki sær út til at hava skilt.

Serliga síðani hesin ídni viðmerkjarin fór á eftirløn sum lektari á Københavns Universitet, hevur langtíðarútisetin fingið sær sum høvuðssport at gera seg klókan upp á líkt og ólíkt í føroyska samfelagnum, ið hann neyan kennir betri enn frá onkrari feriu nú og tá, nú hann hevur búð á flatlondum seinastu 40-50 árini. Men sjálvandi hava bæði Rolf Guttesen og aðrir ídnir útisetaskribentar loyvi at hava sína meining, og tær eru nógvar. Eisini sjálvt um veruleikafjarni, sum so oftani fyrr hevur spælt teimum eitt puss – havandi í huga fjarstøðuna millum Føroyar og Danmark.

**Blaðmaðurin**

**Sosialurin**

Sosialurin
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

Lýsingar

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Støddir:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.